# ítróttur

Nr. 6 • týsdagur • 11. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo




*Lambamaðurin Jón Rosenblad gjørdi bart um vikuskiftið og vann Jútska meistaraheitið í innandurða rógving*

*mynd: www.drekin.fo*

# Knotur eru í Jón Rosenblad

**26 ára gamli lambamaðurin, sum í fleiri ár hevur verið við til at mynda toppin í kappróðrinum heima á landi, staðfesti leygardagin, at hann í løtuni er besti rógvarin í Jyllandi**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Í teimum allar síðstu tøkunum í ólavsøkuróðrinum í fjør var Jón Rosenblad við til at syrgja fyri, at Havnarbáturin vann meistaraheitið. Tað var - fyribils í hvussu so er - endabresturin á róðrarkarrieruni hjá Jón heima á landi. Hann er fyri stuttum farin til Århus í lestrarørindum, men úrslitið í kappingini um jyska meistaraheitið í innandura rógving, sum var í Århus leygardagin, boðar ikki frá, at Jón ætlar at sleppa kappróðrinum.

Í kappingini á 2000 metrum var Jón, sum nú umboðar Aarhus Roklub, bestur av øllum. Hann róði 2000 metrar á maskinuni í tíðini 6.12.1. Næsti maður kom á mál í tíðini 6.15.5. Tað vil við øðrum orðum siga, at sigurin hjá Jón var rættuliga trivaligur.

- Eg havi vant miðvíst á maskinunum síðani á Ólavsøku í fjør. Úrslitið í hesi kappingini vóni eg kann nýtast sum lopfjøl til at sleppa upp í part umborð á onkrum báti her, segði Jón Rosenblad leygarkvøldið við Útvarp Føroya.

26 ára gamli Jón Rosenblad er ættaður úr Lamba, og hann hevur í nógv ár verið ein av føstu fúsunum í føroyskum kappróðri. Trý tey seinastu árini hevur hann verið umborð á Havnarbátinum. Frammanundan var hann umborð á Eysturoyingi.

Um Jón fær onkran stuðul at hjálpa sær við ferðaseðlinum, so ætlar hann sær at luttaka í FM í innandura rógving, sum verður seinni í hesum mánaðinum.

- At sita við maskinuna er ikki sum at rógva við føroyska kappróðrarbátinum. Hetta er sama slag av rógving, sum talan er um umborð á donsku og harvið altjóða bátunum. Eg eri sinnaður at royna møguleikan niðri, og eg vóni, at úrslitið í dag fer at gloppa onkrar dyr, segði Jón Rosenblad við Útvarpið. Hann ætlar sær nú at luttaka í fleiri innandura kappingum í Danmark.


veitst tú ikki tað?
Sosialurin



TOYOTA

**Hjálparleiðari**

Til vælútgjørda plátu- og lakkverkstað okkara søkja vit eftir einum hjálparleiðara at byrja skjótast til ber. Arbeiðið, ið er fjølbroytt og avbjóðandi, fevnir m.a. um:
· Tilrættarlegging av arbeiðsuppgávum
· Kundatænastu
· Umsiting av skaðasýnum
· Fakturering
· Annað fyrifallandi, sum leiðarastarvið inniber

Arbeiðið sum hjálparleiðari er bæði fjølbroytt og avbjóðandi. Afturat tær fært tú eitt úrvalslið av starvsfeløgum, ið tilsamans mynda kjarnuna í einari av landsins fremstu fyritøkum. Reyni Service er DAF- og TSM-góðskugóðkent og arbeiðir samsvarandi hesum krøvum.

Løn sambært avtalu.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Páll av Teiginum á telefon 353065.

Umsókn skal sendast til:
P/F Reyni Service
Boks 1068
110 Tórshavn
Att. Páll av Teiginum

Tel. 353040
www.reyniservice.fo
REYNI SERVICE P/F



STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur til vegadeildina

**Við hesum verður søkt eftir avloysara fyri verkfrøðing, sum er í farloyvi, á vegadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast.**

**Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri:
- Gera ætlanir fyri trygdartiltøk
- Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving og helst við royndum innan omanfyri nevndu virkisøki. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.

**Setanarviðurskifti**
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:
Landsverk
Postsmoga 78
FO 110 Tórshavn

og skal verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 24. januar 2005. Merkið brævbjálvan "Verkfrøðingur til vegadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Heina Eysturoy, virkandi leiðara av vegadeildini, á tel. 31 13 33, teldupostur: he@lv.fo

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land